

www.oljan.fo

**Jan Müller** 30 - 03 - 2013

# Olja byggja brýr millum Hetland og Føroyar

At altjóða oljufeløg í hesum døgum gera milliardaíløgur í olju- og gassvinnuna í Hetlandi kann eisini koma at gagna samvinnuni millum Føroyar og Hetland í framtíðini. Hetlendingar síggja fegnir, at stig verða tikin til nýggj sambond millum oyggjabólkarnar í Norðuratlantshavi. Gassútbygging Júst í hesum døgum uppliva hetlendingar eina menning av olju- og gassídnaðinum, sum kann fáa stóran týdning fyri framtíðina hjá okkara grannum fyri sunnan. Fleiri av heimsins størstu olju- og gassfeløgum gera íløgur fyri milliardir av krónum í eina nýggja oljuframtíð í oyggjunum. Eitt av heimildarfólkunum hjá oljan.fo, Paul Moar, hevur sent okkum myndir frá seinastu hendingunum í sambandi við, at ein risastór gassverksmiðja verður sett upp nærhendis oljuterminalinum Sullom Voe. Heimildarmaður okkara Paul Moar fegnast um, at oljufeløg vilja gera so stórar íløgur í Hetlandi og vónar hann, at henda menning eisini fer at síggjast aftur í Føroyum. Hann ivast ikki í, at Føroyar og Hetland sum næstu grannar kunnu fáa eitt sera gott samstarv á oljuøkinum í framtíðini, sum so aftur kann vera við til at byggja brýr millum oyggjarnar úti í Atlantshavi á øðrum økjum eisini. Myndir frá gassmenningini í Hetlandi. Vit takka Paul Moar fyri, at vit kunnu brúka hesar myndir.